## DAGSINS MEINING

# Privatisering

Ein grundgeving fyri privatisering er ein trúgv uppá, at marknaðarkreftirnar syrgja fyri besta raksturin á privatum hondum, og at tað almenna ikki kann gera hetta eins gott. Eitt er teori, og eitt annað er praksis. Sjóvinnubankin fór á heysin undir privatari leiðslu ikki minni enn tríggjar ferð í sínari søgu. Privat riknu fiskavirkini fóru á heysin, og tí er Fiskavirking alment. Tað sama er við Føroya Banka. JFK trol er rikið av tí almenna í áratíggju og enntá so væl, at inntil fyri fáum árum síðani høvdu klaksvíkingar og flestu føroyingar gloymt, at JFK Trol var ein almenn fyritøka. Fyritøkur sum Atlantic Airways og Føroya Tele eru úrslit av, at vit høvdu visionerar politikarar, ið vistu, at marknaðarkreftirnar ikki automatiskt tryggja menning í Føroyum. Tann privati sektorurin í Føroyum hevur ikki altíð verið tann mest framatlítandi sektorurin, og omanfyrinevndu dømi eru bert fyri at vísa, at teoretiskar generaliseringar, sum t.d. at tað privata altíð vil reka eina fyritøku betri enn tað almenna, hava lítið virði, tí tað vil altíð verða tengt at umstøðum, hvør rekur o.s.fr.

Tað er tó lítil ivi um, at tað er óheppið, at landið eigur so stóran part av føroyska vinnulívinum í dag, men søguna kunnu vit nú einaferð ikki broyta uppá.

Vit eiga í privatiseringskjakinum at skilja ímillum fyritøkur, ið hava við undirstøðukervið at gera og so hinar. Tað vildi verið skeivt at selt til dømis telekervið til hægstbjóðandi. Landið kundi til samanberingar ikki droymt um at selt okkara landsvegir til hægstbjóðandi at selt billetir á.

Spurningurin við hinum almennu fyritøkunum, er hvussu tær skulu seljast, yvir hvussu langa tíð og til hvønn. Í hesum sambandi var uppskotið um at lata øllum føroyingum partabrøv í Føroya Banka eitt áhugavert hugskot. Um allar almennar ognir skulu seljast í einum, so er kapitalurin ikki til staðar í Føroyum.

Ger tað nakað? Vinnumálaráðið niðursetti herfyri ein arbeiðsbólk at hyggja at, um tað gjørdi nakað, um útlendingar keyptu t.d. Fiskavirking. Hesin bólkur kom fram til ta rættiliga studentikosu niðurstøðu, at tað ikki gjørdi mun, hvør átti, tí at ein og hvør eigari vildi tryggja optimalan rakstur, og bólkurin yvirsá harvið púra møguleikan fyri, at Fiskavirking kann gerast eitt einkult lið í einari langari virðisketu við virkjum í nógvum londum. Um hetta hendir, so er tað samlaða ketan, sum skal geva mest møguligt, og har kann úrslitið hjá einum einkultum liði verða ofrað fyri heildina, og tí er vandi á ferð, um vit bert sita við tí eina liðnum í Føroyum.

Omanfyristandandi vísir, hvat er galið í privatiseringskjakinum. Vit mugu diskutera privatiseringar út frá heiminum, sum hann er, og ikki sum hann burdi sæð út teoretiskt. Marknaðarkreftirnar klára nógv, men ikki alt. Um hetta ikki verður ásannað frá politiskari síðu, so er vandi fyri ov bráum avgerðum. Privatiseringskjakið má ikki býtast upp í tey, sum vilja privatisera alt her og nú og so tey, ið als ikki vilja hoyra talan um nakra privatisering. Ein millumleið má veljast.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tinitusherindir fullveldismanna

**Edmund Joensen**



Tað letur til at fullveldismenn fáa "tinitusherindir", ella tað sum verri er, av at hoyra okkum aðrar viðgera vánaligu fruktirnar av teirra 6-ára fullveldispolitikki.

### Nýggja gandaorðið er raðfesting

Bæði Vagnur Mikkelsen og ein sum nevnist Heri Ziska hava tikið upp eftir teirra politiska formann nýggja gandaorðið "raðfesting". sum nú eisini er teirra universalloysn uppá allar fíggjarligar trupuleikar. Fyrr var tað soleiðis, at peningur skuldi til fyri at reka samfelagið. Í dag snýr tað seg eftir øllum at døma ikki um pening men bert um raðfesting. Fyri nøkrum árum síðan var gandaorðið "skipa loysing" sum skuldi greiða allar fíggjartrupulleikar.

### Vagnur Mikkelsen

Í skoluni hann hevði til løgtingsformannin fýltist hann á at løgtingshúsið er vorðið 17 milliónir krónur dýrari enn ætlað. Her er adressan áleið. Men í nýggjari grein spillur hann spælið og gevur sær sjálvum dyggiliga framman á, hann greiður frá, at tað var fullveldislandsstýrið, sum umframt at hækka sínar egnu lønir, setti sær fyri at byggja sítt egna slott, løgtingshúsið, við Tinghúsvøllin.

Í báðum greinunum ilskast hann inn á løgtingsformannin fyri ikki at tryggja teimum gomlu døgverðamat. Her er adressan sera ivasom, tá tað er landsstýrismaðurin í almanna-málum, sam varar av hesum øki, og sum sigur seg vera í ferð við at royna at finna pening til endamálið. Tað hoyrir kanska við nú, vit viðgera pensionistar, at tað var júst undiritaði sjálvur, sum fyri sambandsflokkin legði uppskotið fyri Tingið, um at játta 800 milliónir í Sammhaldsfasta. Hetta var meðan peningurin enn var til, men sum fullveldissamgongan feldi.

### Heri Ziska

Spyr hvussu eg ætli mær at loysa fíggjarligar trupulleikar við peningi, sum fullveldismenn hava forkomið okkum við at minka blokkin. Ein ikki serliga fornuftigur spurningur má sigast. Eins og Vagnur Mikkelsen er hann fullvísur í, júst sum politisku lærusveinar hansara hava boða, at blokkurin onki hevur við føroysk fíggjarviðurskifti at gera. At blokkurin er beinleiðis skaðiligur fyri Føroyar. À sama hátt sum Vagnur Mikkelsen, og allir aðrir fullveldismenn hava gjørt tað síðan heimastýrislógin var samtykt, krevur hann av sambandsmonnum, at teir skulu loysa trupulleikarnar, hvørja ferð fullveldismenn hava koyrt føroyska samfelagið fíggjarliga fast.

Eftir øllum at døma hava teir gloymt, at fullveldislandstýrið brúkti milliónir uppá at lýsa og prógva, m.a við hvítubók, at føroyingar, baði gomul, ung og børn, fingu tað nógv betur tá teir høvdu fríðað okkum frá skaðiligu árinunum frá ríkisveitingunum.

### Blokkurin

Fyri fáum árum síðan var blokkurin helvtin av frumninntøkunum til føroyska samfelagið. Blokkurin var helvtin av grundarlagnum undir føroyska búskapinum. Tær 400 miljónir krónurnar um árið framyvir, sum fullveldismenn hava lorkað burtur eru ikki bert 400 miljónir krónur árliga. Tær eru í fyrsta lagi fruminntøkur uppá 400 miljónir krónur, sum stórt sæð allar verða útgoldnar í lønum til føroyingar, og sum longu árið eftir hava ført við sær, meira enn 200 miljónir krónur afturat í skatta og avgjaldsinntøkum til tað almenna. Tær 400 miljónir krónurinar árliga merkja uppá sikt meginpartin av einari milliard krónum um árið, til føroyska búskapin.

### Samanumtikið

Bæði Vagnur Mikkelsen og Heri Ziska leggja meg undir at nokta føroyskum pensionistum mat í munnin. Enn havi eg ikki møtt nøkrum føroyingi, hvørki politikkara ella nøkrum øðrum, sum ikki er góður við okkara gomlu. Og tað er mín vón at tað eydnast landsstýrismanninum í almannamálum at tryggja pensionistunum eina góða tænastu.

Tað sum eg havi ført fram í hesum sambandi er, at ábyrgdarleysi fíggjarpolitikkur fullveldis-manna er í ferð við at ganga út yvir tey gomlu og tey veiku. Ikki tí at eg haldi hetta vera rætt, men tí at hetta er ein náttúrulóg um allan heimin. Tá tað gongur afturá í einum landi, so gongur tað fyrst av øllum út yvir tey gomlu og veiku, ikki tey sterku.

Sum Vagnur Mikkelsen segði, so legði fullveldislandsstýrið til brots við at hækka teirra egnu lønir og at byggja sær slott við Tinghúsvøllin, hann kundi nevnt nógv onnur slott eisini.

Tað er lítið sannlíkt at fullveldisprofetarnir, tá avleiðingarnar av fullveldispolitikkinum av álvara sláa ígjøgnum, fara at ríva niður teirra slotsbygningar, og tað er líka óhugsandi at teir fara at lækka sínar egnu lønir fyri at hjálpa teimum gomlu og veiku. Kalla tað raðfesting ella okkurt annað. Úrslitið fyri tey gomlu og veiku er givið framman undan.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.